# Fundarfrásøgn

| | |
|---|---|
| Heiti: | Leiðslufundur |
| Sendast til: | Sigurð í Jákupsstovu (SíJ), Jørgen Meitilberg (JM), Malan Marnersdóttir (MM) og Hans Pauli Joensen (HPJ) |
| Til staðar á fundinum vóru: | SíJ, JM, MM, HPJ og Randi Frederiksberg (RF) |
| Skrivað hevur: | RF |
| Fundartíð: | Týsdagur, 5. november 2013, kl. 9 til 12 |
| Fundarstað: | SSS |

## Umrødd evni:

1. **Tað er óheppið at eingin lønarmunur er á adjunkti, ið hevur ph.d., og lektara.**

   Lýsingarnar av størvunum eru fløktar og ógreiðar. Samtykt varð at endurskoða tær, tá ið bygnaðarbroytingarnar eru komnar longur áleiðis.

   JM tekur málið upp við felagið og við lønardeildina.

2. **Fíggjarviðurskifti – umrøða av nýtslu, inntøkum, o.t. (MM)**

   Verður tikið upp á næsta fundi (7. nov.)

3. **Áheitan frá Heilsumálaráðnum sum ynskir tilmæli um umboð í arbeiðsbólk, sum skal útgreina lóggávuna viðvíkjandi ílegukanningum og gransking (JM)**

   Leiðslan hevur viðgjørt málið.

4. **Stovnseting av professorati/lektorati í heilsuvísindum (HPJ)**

   HPJ legði fram. Leiðslan heldur tilmælið vera áhugavert og tekur undir við, at arbeitt verður víðari við málinum.